# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Inn í jólamánaðin í stórari óvissu

Ein av stóru politisku spurningunum í hesum døgum er, hvussu tað verður við fíggjarlógini fyri 2010. Uppskotið er í fíggjarnevndini, og úr henni frættist, at viðgerðin ongan veg er komin enn. Ein av óvissunum er, hvat tað er fyri grundarlag, sum nevndin arbeiðir út frá. Í ólavsøkupakkanum varð karmurin ásettur. Um karmurin skal haldast, so er neyðugt, at sparingar verða framdar fyri 160-170 milliónir krónur. Talan er um sparingar, sum tingið skal samtykkja í løgtingslógum. Uppskotini hesum viðvíkjandi eru ikki løgd fram á tingi enn, og nú fer tíðin at ganga undan.

Ætlanin hevur verið, at álitið frá fíggjarnevndini skuldi leggjast fram 10. desember. Tað er hósdagin í aðru viku. Tingskipanin ásetur, at tað í minsta lagi tekur eina viku frá tí, at eitt lógaruppskot verður lagt fram á tingi, og til tað kann samtykkjast við triðju viðgerð. Tá ið einki av spariuppskotunum enn er komið fyri tingið, ber tað til at gera ta niðurstøðu, at tað ikki ber til hjá fíggjarnevndini at brúka ætlaðu sparingarnar sum grundarlag fyri sínum arbeiði.

Spurningurin er so, um útreiðslukarmurin skal økjast við hesum 160-170 milliónunum, ella um sparingarnar skulu gerast á tann traditionella mátan. Tað vil siga, at eitt sindur verður tikið frá øllum økjum.

Fíggjarnevndarformaðurin og fólkaflokkurin hava markerað, at teir vilja ikki finna seg í, at karmurin ikki fer at halda. Javnaðarflokkurin tykist meira sinnaður fyri at glíða í vælferðarinnar navni, meðan sambandsflokkurin hevur verið eitt sindur ullintur. Løgmaður segði ein dagin, at karmurin ikki var púra fastur, men seinni segði hann her í blaðnum, at hann stóð við ásetta karmin.

Ein onnur óvissa er, um tað er semja innanhýsis í flokkunum um, hvørji tiltøk skulu fremjast fyri at fáa fíggjarlógina at hanga so frægt saman, sum tað er avgjørt, at hon skal. Skulu inntøkurnar økjast við skattahækkingum, og hvar skal sparast.

Norðlýsið visti í gjár at siga frá landsbankastjóranum, at hann er farin at leita eftir fígging til undirskotið. Í fyrstu atløgu skal ein milliard fáast til vega. Um tað fer at ganga, sum tað verður roknað við, so skulu tað komandi árini fáast fleiri milliardir til vega, og tað fer aftur at seta fíggjarlógina undir trýst, tí rentuútreiðslurnar fara at økjast. Tað er eingin óvissa um, at útreiðslurnar til eldraøkið komandi árini fara at økjast. Í vikuni hoyrdist, at Heimarøktin næstu árini fer at hava brúk fyri fleiri hundrað fólkum aftrat, um tænasturnar til tey eldru skulu varðveitast á tí støðinum, tær nú eru.

Óvissan er stór, og avbjóðingarnar eru nógvar. Arbeiðið við fíggjarlógini skal fremjast. Í løtuni tykist tað sum um, at tað verður fíggjarnevndin, sum skal fremja arbeiðið heldur enn landsstýrið. Tíðin er knøpp, og um fíggjarlógin verður jólatrøll, so verður endin ivaleyst løgtingsval. Tað fer bara at gera óvissuna uppaftur størri.

**Sosialurin**

## OASAN

**HERI MOHR**





*Hvíldarheimið Naina varð stovnað til sjúk og troytt konufólk*

Ein lítil sólskinssøga: Ein ung donsk genta, Naina Scarla Nielsen, fødd 1893, hevði nomið sær útbúgving á einum kendum húsarhaldsseminarium. Har hevði hon hitt fleiri føroyskar gentur, og soleiðis fekk hon hug at kanna, hvussu viðurskiftini vóru í Føroyum. Tessvegna fór hon til Føroyar. Tað gjørdist henni skjótt greitt, at í Føroyum var tørvur á útbúgving og upplæring á húsarhaldsøkinum. Hon fór undir skeiðvirksemi í Havn og á bygd, og hon dugdi at síggja, at neyðugt var at virka fyri einum húsarhaldsskúla í Føroyum.

Ta fyrstu tíðina leigaði hon høli, sum skjótt gjørdist ov trong, men longu í 1929 var ein statgóðkendur húsarhaldsskúli settur á stovn í Havn við plássi fyri umleið 20 næmingum, sum ikki stóð á at fáa í skúlan.

Landbrúkskonsulenturin Mads Winther Lützen undirvísti í urtagarðsbrúki og hon sjálv (Naina) í húsarhaldi og hondarbeiði. Til undirvísing í neyðhjálp og reinføri undirvísti ein donsk sjúkrasystir.

Hóast heilsan ikki var góð, arbeiddi hon áhaldandi fyri at náa tað stóra ynski: At stovna eitt heim fyri sjúkum og troyttum konufólkum vælvitandi, hvussu strævið tey føroysku konufólkini høvdu tað.

Hetta skuldi hon tó ikki náa. Naina Scarla doyði á Dronning Alexandrines Hospital (nú Landssjúkrahúsið) tann 8. september 1934, bert 41 ára gomul.

Við hennara testamenti og ágrýtni frá hennara góðu vinum varð Hvíldarheimið Naina veruleiki í 1936.

Men trongligt var við tí fíggjarliga. Einaferð sama árið vitjaði blaðstjórin á Berlingske Tidende NAINA, og hendan dagin áttu tey ikki pening – 1 krónu og hálvtrýss oyru – til fiskadøgurðan. Blaðstjórin hjálpti teimum við døgurðanum, - og frá einum gomlum blindafelag í Keypmannahavn útvegaði hann NAINA fimm túsund krónur sum gávu.

Hann, ið hetta skrivar, hevur í hesum døgum notið eina Shangri-Latilveru á Hvíldarheiminum NAINA. Hesi fáu orð skulu tessvegna vera ein tøkk og heilsan til øll, ið starvast á hvíldarheiminum.



*Danska Naina Scarla Nielsen doyði bert 41 ára gomul*

## Mentan

**HERI MOHR**



Í einum kronikki vil Uni Arge, journalistur og bankamaður, vera við, at danskir prestar hava bronglað tey føroysku fólkanøvnini. Um teir nú veruliga hava gjørt tað, hava teir valla gjørt tað við góðum og fullum vilja. Bureaukratiið átti óivað sín leiklut.

»Navnið spillir ongan mann,« siga vit.

Um tað er eftirfarandi, er nærliggjandi at spyrja: Hvørji nøvn hava so spilt okkara móðurmál? Jacob, Nicolai, Richard, Osvald, Jens Christian, Mads, Poul? Tað ber ikki til, at tey eru orsøk til málspillu. Hesi nøvn finnast millum tey frægu í okkara mentanar- og málsøgu.

Og so teir donsku prestarnir? Jamen, eru tað ikki júst teir, sum góvu okkum europeiska mentan, ta mentan, sum gjørdi føroyingin til føroying? Vit kunnu nevna nøkur nøvn, sum løgdu rygg til: Gamli Grundtvig, nógvir háskúlastjórar, sonur Grundtvig, Svend, sum tó ikki var prestur, Kingo, Brochmann, Ingemann, prestasonur, men ikki prestur, Jørgen Landt, Emil Bruun, Gudmund Bruun, Faulenborg (lesið bókaverkið hjá Hanusi Andreassen (nú Kamban) um Janus Djurhuus II, síðu 73). Ella Peter Børresen í *Det gode håb* hjá William Heinesen.

Tær gomlu kirkjubøkurnar (og kirkjubøkur yvirhøvur) mugu vit umsita bæði væl og virðiliga.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.